# Politikkur á pubbini

**Í morgin, leygardagin, skipar nýggja kvinnufelagið í Suðuroy, Valkyrjurnar, fyri almennari valkafé í pubbini á Tvøroyri við kvinnuligu valevnunum í Suðuroy**

Nú tað stundar til løgtingsval, verður eitt tiltak í Pubbini á Tvøroyri, har kvinnuligu valevnini í Suðuroy fara at leggja fram sína hugsan um ymisk evni. Tiltakið verður í morgin, leygardagin klokkan 18. Kjakevnini vera Ungdómspolitikkur, Útbúgvingar- og endurbúgvingarmøguleikar,

Kommunusamanlegging og tey fara eisini at kjakast um rættindini hjá fólkum, sum búgva á sambýli.

Tiltakið er skipað soleiðis, at valevnini fáa tvey evni í part, at røða um. Fyrst verður eitt umfar, har valevnini hava hvør sína framløgu um ungdómspolitikk og um útbúgvingar- og endurbúgvingarmøguleikar. Aftaná eru møguleikar hjá áhoyrarunum at seta valevnunum spurningar. Síðani er ein stuttur steðgur, áðrenn annað umfar, ið verður um kommunusamanlegging, og rættindini hjá fólkum, sum búgva á sambýli.

**-áki-**

## Seks eru nú ákærdir

Ákæruvaldið í Íslandi hevur nú ákært seks menn í sambandi við tað sokallaða Pólstjørnumálið, har menn royndu at smugla eina stóra nøgd av rúsevnum við einum stuttleikabáti til Íslands seinasta summar. Smuglararnir vórðu avdúkaðir á vegnum og tiknir, tá stuttleikabáturin kom inn á Fáskrúðsfjørðin. Fimm av monnunum sita í varðhaldi. Ein teirra situr í varðhaldi í Føroyum og verður ætlandi ákærdur her, skriva íslendsk bløð.

**- árni**



*Støðan kundi verið lívshættislig í Norðskálatunlinum, staðfestir Landsverk í eini minni frágreiðing*

Mynd: Jens Kristian Vang

# Frágreiðing um tunnilseld

Í eini minni frágreiðing um eldin inni í Norðskálatunlinum, sum liggur á heimasíðu teirra, staðfestir Landsverk, at støðan kundi verið lívshættislig, um ikki ein maður hjá Landsverk fekk skipað soleiðis fyri, at ferðslan varð steðgað. Landsverk finnist tó at fólki, sum hóast nógva roykin ikki steðgaðu, men koyrdu gjøgnum tunnilin. – Fólk reagera ofta við at seta ferðina upp og skunda sær gjøgnum roykin, í staðin fyri, sum rætt er, at venda við aftur, siga tey millum annað. Tey vísa annars til ein faldara um atferð í tunlum, sum kann heintast á heimasíðu teirra. Landsverk sigur tó einki um vantandi trygdarskipan, men sigur seg í løtuni kanna hendingina niður í smálutir.

**- rólant**


SERNÁMSDEPILIN

## Sálarfrøðingur í NSR tænastuni í Eysturoy

**Í Sernámsdeplinum er eitt sálarfrøðistarv leyst til setan skjótast til ber.**

Dagliga tænastustaðið er í NSR tænastuni í Eysturoy, Glyvravegur 10 B, Glyvrar.

Vit leggja dent á kollegiala supervisión, og fær sálarfrøðingurin tí góð líkindi til neyvt samstarv við hinar sálarfrøðingarnar í skipanini og til førleikamenning eftir umstøðum og tørvi.

NSR tænastan er eitt samtak ímillum Sernámsdepilin og Runavíkar-, Nes-, Sjóvar-, Leirvíkar-, Gøtu- og Fuglafjarðar kommunur. NSR tænastan virkar sum sjálvstøðugur stovnur undir Sernámsdeplinum og veitir skúlum, stovnum, foreldrum og myndugleikum námsfrøðiliga- og sálarfrøðiliga ráðgeving.

Høvuðsuppgávan hjá NSR tænastuni er at kanna førleikastøðu og læruumstøður hjá børnum við serligum tørvi og at ráðgeva í skipan av undirvísingarligum- og mennandi tiltøkum fyri hesi. Manningin í NSR tænastuni er ein samskipari, ein sálarfrøðingur og 3 serlærarar/ ráðgevar

Sálarfrøðingurin, ið vit sóknast eftir, hevur ein týðandi lut í hesum toymi, ið í samstarvi við Sernámsdepilin støðugt skal menna sernámsfrøðiliga virksemið.

**Útbúgvingarkrøv og eginleikar**

- Cand. ped. psyk./ cand. psyk. – ella samsvarandi.
  Fyrimun hevur umsøkjari, ið hevur arbeitt við børnum.
- Fakligan førleika og hug at arbeiða bæði við kliniskt – psykologiskum og pedagogiskt – psykologiskum uppgávum.
- Duga at nýta kanningarúrslit í ítøkiligum undirvísingar – og viðgerðartilmælum.
- Hava hug og evni til neyvt samstarv við aðrar fakbólkar.
- Vitan um nervasálarlig greiningarámboð er eisini ein fyrimunur.

Løn eftir sáttmála við avvarðandi fakfelag.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Hans Eli Dahl, stjóra, tlf. 314522/ 225803, (e-mail hanseli@snd.fo) ella Hans Jón Thomsen, samskipara, tlf. 239190, (e- mail hjt@nsreystur.fo)

Umsókn við avriti av próvskjølum v. m. skal vera Sernámsdeplinum í hendi í senasta lagi mikudagin tann 30. januar 2008 og skal sendast til:

**Sernámsdepilin**
Frælsið 32 · Postrúm 2036
FO 165 Argir · Tlf. 314522 · Fax 310196
e-postur: sernamsdepilin@snd.fo



SERNÁMSDEPILIN

## Ráðgevandi fysioterapeutar

Í Sernámsdeplinum er eitt avloysarastarv fyri fysioterapeut í farloyvi restina av hesum skúlaári (til 30. juni 2008) leyst at søkja til setan skjótast til ber. Fysioterapeuturin í farloyvi hevur verið í ½ tíðarstarvi, men eftir umstøðunum verður avloysarin í fulltíðarstarvi nevnda tíðarskeið. Talan kann eisini vera um 2 hálvtíðar avloysarastørv.

**Arbeiðsstað**
Setanin er í Sernámsdeplinum í Tórshavn, men er arbeiðsøkið kanning og ráðgeving viðv. børnum og ungum (0-18 ár) kring alt landið. Eftir umstøðunum kann arbeiðið skipast høgligast møguligt í mun til bústaðin hjá tí, ið sett/ settur verður. Tó má viðkomandi eftir tørvi vera tøkur at luttaka í greiningararbeiðinum í Sernámsdeplinum og at ráðleggja saman við verandi ráðgevandi fysio-/ ergoterapeuti og øðrum fakfólki í Sernámsdeplinum.

**Uppgávur**
Høvuðsuppgávan er í greiningararbeiði at skipa fyri rørsluligum kanningum av børnum og at luttaka í eygleiðing av børnum, ið eru undir kanning. At veita ráðgeving til stovnar, foreldur og tey, ið annars eru um børnini, ið hava rørsluligar trupulleikar. Ein minni partur kann vera viðgerandi venjing. Arbeitt verður í samstarvi við HTM og Barnadeildina á LSH.

**Førleikakrav**
Útbúgvin fysio- ella ergoterapeutur. Fyrimun hevur umsøkjari við eftirútbúgving og/ ella royndum at kanna smábørn við serligum atliti til sansamenning. Tó eru fysio- ella ergoterapeutar, ið ikki heilt halda seg hava henda førleika, vælkomnir at søkja, um teir við skeiðluttøku og á annan hátt eru sinnaðir at taka við førleikamenning, ið Sernámsdepilin kann stuðla til.

**Løn og arbeiðstíð**
Eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag. Arbeiðstíð, frítíð o.a. verður løgd til rættis í samráð við stjóran í Sernámsdeplinum.

Meira fæst at vita við at venda sær til Hans Eli Dahl, stjóra, ella Maluna Justinussen, ráðgevandi eygleiðara, Sernámsdepilin tlf. 314522.

Umsókn við avriti av próvskjølum og møg. m. skal vera Sernámsdeplinum í hendi í seinasta lagi tann 25. januar 2008.

**Sernámsdepilin**
Frælsið 32 · Postrúm 2036
FO 165 Argir · Tlf. 314522 · Fax 310196
e-postur: sernamsdepilin@snd.fo